# Kyndil í hálva

**Fríggjadagin var almenn móttøka í Miðlahúsinum fyri nýggju bókini hjá Suna Merkisstein, Bjartur lýsir kyndilslogin. Henda bókin lýsir fyrstu 50 árini av søguna hjá hondbóltsfelagnum Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Miðlahúsið var mest sum fult av fólki, tá ið nýggja bókin hjá Suna Merkisstein, Bjartur lýsir Kyndilslogin, bleiv løgd fram í Miðlahúsinum fríggjadagin. Bókin umrøður tey fyrstu 50 árini av glæsiligu søguna hjá hondbóltsfelagnum Kyndli.


*Annsy Høghamar, sum syrgir fyri øllum hagtølum hjá Kyndli í dag, handar her Hannisi Jacobsen eitt eintak av nýggju bókini. Hannis stóð í nógv ár á odda fyri hagtølunum hjá Kyndli.*

### Sprottið úr Losjuni

Tann 10. mars 1956 bleiv helst mest sigursvanda felagið í føroyskum hondbólti sett á stovn. Nógv fólk var komið saman til stovnandi aðalfund í Losjuni hetta leygarkvøld, og í alt 37 fólk skrivaðu seg upp sum lim sjálvan stovningardagin. Hetta var byrjanin uppá søguna hjá hondbóltsfelagnum, Kyndli.

Kyndil var sprottið úr ungmannadeildini hjá Losjuni, og hetta felag var eitt avhaldsfelag burturav. Fyrstu árini vóru tað bert limir í Losjuni, sum sluppu at umboða Kyndil. Liðini byrjaðu at spæla í táverandi meðaldeildini, sum svarar til okkara 2. deild, men longu fyrsta árið flutti besta mansliðið hjá Kyndli upp í bestu deildini.

Menninir gjørdu skjótt av. Teir vunnu meistaraheitið longu í fyrstu royndini í 1957, og eftir hetta vunnu teir meistaraheitið á hvørjum ári líka fram til 1968, tá ið teir blivu koppaðir av vestmenningum. Í hesum tíðarskeiðinum vunnu kvinnurnar hjá Kyndli eisini sítt fyrsta meistaraheitið. Hetta var í 1964.

### Høllin kom

Í 1970 kom ítróttarhøllin á Hálsi, og hetta gjørdist ein broyting fyri hondbóltin í Havnini. Nú gingu ungdómar og spældu í høllini dagliga, og hetta gjørdi, at fleiri fólk komu at umboða Kyndil, sum ikki vóru limir í Losjuni.

Upp ígjøgnum 70 árini sær man burturfrá limaskapi í Losjuni, og hetta eru fyrstu broytingarnar í hondbóltsfelagnum. Sjálvt um liðið er fyri ávísum broytingum, so vísir hetta seg ikki at ávirka úrslitini. Kyndil blívur við at halda fast í oddinum í føroyskum hondbólti, og eftir tapið fyri VÍF í 1968 vinnur Kyndil aftur meistaraheitið seks ár á rað í árunum frá 1969 til 1974.

Í 1975 blivu kyndilsmenninir tó enn einaferð steðgaðir av VÍF. Í staðin vóru tað kvinnurnar hjá Kyndli, sum tóku yvir. Tær megnaðu nevniliga at tryggja Kyndli næsta meistaraheitið í bestu kvinnudeildini hetta árið.

Besta mansliðið hjá Kyndli var aftur á ovastu rók í 1976 og 1977, áðrenn teir blivu steðaðir av Neistanum

# Sera áhugavert

**Niels Nattestad hevur hjálpt eitt sindur til við kyndilsbókini, og hann helt arbeiði vera ótrúliga áhugavert. Hann sigur eisini, at hann minnist eina hending í søguni hjá Kyndli serliga væl**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

- Hetta hevur verið sera áhugavert. Arbeiði hevur verið spennandi, men tað hevur eisini verið drúgt til tíðir. Vit hava gjørt nógv detektivarbeiði fyri at finna ávísar upplýsingar, men nú eru vit komin á mál.

Orðini eigur Niels Nattestad, vanliga nevndur Natte, sum hevur hjálpt til við bókini. Natte byrjaði á besta liðnum hjá Kyndli í 1965, og hetta árið vunnu teir meistaraheitið. Hetta var ein stór løta fyri hann, tí hetta var sjálvsagt hansara fyrsta føroyameistaraheiti. Hann hevur eisini spælt hondbólt í fleiri ár, og eftir hetta hevur hann siti í nevndum hjá Kyndli í ein mansaldur.

Natte gleddist um hjálpina, teir høvdu fingið frá øllum, og hann helt tað vera spennandi at hyggja ígjøgnum allar tær gomlu myndirnar.

- Tað hevur verið stuttligt at sæð allar tær gomlu myndirnar, sum vit hava fingið. Hetta hevur vakt nógv gomul minni.

Tá vit at enda spurdur Natta, um tað er nøkur serlig hending, sum hann minnist serliga væl, var hann ivaleysur.

- Ja, har er ein hending, sum stendur frammarlaga í huganum. Tað var, tá vit vunnu meistaraheitið í 2004. Vit møttu VÍF í síðsta dystinum, og tá tvey sekund vóru eftir fingu vit brotskast. Hetta sendi Jónleif Sólsker í netið, og við hesum málinum gjørdist Kyndil føroyameistari.


*Niels Nattestad, vanliga kallaður Natte, var tann fyrsti sum tók orðið á móttøkuni. Hann segði eitt sindur um bókina og um søguna hjá Kyndli.*